**Nr. 5/2015**

**Bjørn Kalsø**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um fíggjarstøðuna, settur Kristinu Háfoss, landsstýriskvinnu (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Hvussu stórt roknar landsstýriskvinnan, at landskassahallið verður í 2015?
2. Hvussu nógv veksur hallið í 2015 orsakað av eykajáttanarlógini, sum landsstýriskvinnan stutt síðan hevur lagt fyri Løgtingið?
3. Hvussu nógv økjast rakstrarútreiðslurnar orsakað av nevndu eykajáttanarlóg?
4. Hvussu nógv økjast íløguútreiðslurnar orsakað av nevnda uppskoti?
5. Hvussu nógv økjast lógarbundnu útreiðslurnar orsakað av nevnda uppskoti?
6. Hevur uppskotið jaliga ávirkan á haldførið í búskapinum?
7. Heldur landsstýriskvinnan tað verða skilagott at økja um hallið á fíggjarlógini í einum frammanundan heitum búskapi?
8. Hvørji stig hevur landsstýriskvinnan í hyggju at taka til tess at venda gongdini, so avlop fæst á fíggjarlógini?
9. Hevur landsstýriskvinnan slept ætlanunum um at fáa javnvág ella yvirskot á fíggjarlógina í 2016?
10. Um ætlanir framvegis eru at fáa hallið burtur, nær kann so roknast við, at svørt tøl aftur verða at hóma í landshúsarhaldinum?

**Viðmerkingar:** Nógv hevur verið tosað um aftur at fáa javnvág á fíggjarlógina. Eisini andstøðan, ið sat undan valinum 1. sept., og núverandi samgonga høvdu hetta sum aðalmál. Men nú fyrstu uppskotini frá nýggja landsstýrinum eru løgd fyri tingið, sær út til, at gongdin er hin øvuta.

**Á Løgtingi, 30. oktober 2015**

Bjørn Kalsø